UTTAN ÚR HEIMI

## Ikki hesaferð

Tað eydnaðist ikki norska ráðharranum í menningarmálum, Hildu Frafjord Johnson, at fáa starvið sum leiðari í menningargrunninum hjá ST, UNDP. Týsdagin kunngjørdi Kofi Annan, aðalskrivari, at hann hevði gjørt av at seta fyrrverandi turkiska fíggjarmálaráðharran Kemal Dervis í starvið.

Kemal Dervis verður ofta kallaður "undurmaðurin", tí tað eydnaðist honum at endurreisa turkiska búskapin eftir eina sera álvarssama kreppu fyri fýra árum síðani. Hann hevur eisini altjóða royndir, tí frá 1977 til 2001 starvaðist hann í Heimsbankanum, og tey seinastu var hann varastjóri við serligari ábyrgd fyri virksemi bankans í teimum fátækastu londunum. Nú tekur hann so við sum leiðari í UNDP eftir bretan Mark Mulloch Brown.

Norskir fjølmiðlar skriva, at Hilde Frafjord Johnson fer uttan iva at leggja seg eftir at fáa okkurt annað altjóða leiðarastarv, men fyribild heldur hon fram sum norskur menningarmálaráðharri.

## Dagbók hjá Reagan

Tey átta árini Ronald Reagan var amerkanskur forseti, skrivaði hann dagbók, og nú verður arbeitt við at geva dagbókina út.

Forlagið HarperCollins, sum skal geva dagbókina út saman við stovninum Ronald Reagan Presidential Library Foundation, sigur, at Reagan skrivaði dagbók hvønn einasta dag tey átta árini, hann var í Hvítu Húsunum, og at alt er skrivað við hond.

Frederick Ryan, sum er formaður í Reagan-stovninum, sigur við AP, at tann gamli forsetin hevði neyvan ætlað, at dagbók hansara skuldi koma út sum bók, men at innihaldið er so mikið áhugavert, at tað uttan iva hevur áhuga ímillum fólk. Eitt nú greiðir Reagan frá sínum hugsanum um bæði søguligar og dagligar tilburðir.

Ronald Reagan doyði fyri skjótt einum ári síðani, 93 ára gamal. Tá hevði hann havt Alzheimers í fleiri ár.

## Misnøgd við valúrslit

Fólk í túsundatali tustu út á gøturnar í høvuðsstaðnum í Togo, Lome, týsdagin, tá almenna valnevndin kunngjørdi, at Faure Gnassingbe hevði vunnið forsetavalið.

Sambært valnevndini fekk Faure Gnassingbe meiri enn 60 prosent av atkvøðunum, meðan andstøðuvalevnið, Bob Akiotani, fekk 38 prosent. Valnevndin sigur, at úrslitið er endaligt, men lógin sigur kortini, at landsins grundlógardómstólur skal góðkenna tað, og andstøðan hevur heitt á dómstólin um at ógilda úrslitið. Andstøðan ivast ikki í, at myndugleikarnir hava svikað, og hon krevur tí umval undir eftirliti.

Faure Gnassingbe tók við eftir faðirin, sum doyði í februar, og hann var ímóti at halda forsetaval nú. Tað eydnaðist kortini andstøðuni at noyða hann at skriva út val. Stýrið í Togo verður vanliga roknað sum einaræði.

## Leitar eftir oljuleiðum

Norska oljufelagið Hydro hevði eitt metgott úrslit í fjør, men felagið hevur kortini ein trupulleika at dragast við. Felagið framleiðir so nógva olju nú, at tað fer at minka í brunnunum, samstundis sum tað hevur gingið illa at finna nýggjar leiðir.

Tí umhugsar Hydeo at keypa oljuleiðir ella partar av oljuleiðum, men tað er heldur ikki so lætt. Tað hevur víst seg at vera trupult at sleppa fram at leiðunum í Iran og Russlandi, og á norsk landgrunninum er eingin leið til sølu. Tí noyðist Hydro helst at venda eygunum ímóti Kanada, Meksikoflógvanum og Vesturafriku, skrivar Aftenposten.

Hydro framleiðir í løtuni umleið 575.000 tunnur av olju í meðal um dagin. Samstundis hevur felagið boðað frá, at tað ætlar at framleiða meiri aluminium.

# Heimsins størsta á flogi



*Heimsins størsta ferðamannaflogfar, Airbus A380, var royndartúr í gjár. Flogfarið, sum er bygt á teirri stóru flogverksmiðjuni í Tolouse í Fraklandi, er í tveimum hæddum og hevur setur til 555 ferðafólk, men pláss fyri 800 fólkum. Roknað verður við, at tað nýggja flogfarið fer serliga at flúgva á teimum longu teinunum so sum ímillum Evropa, Asia og USA.*

# Mundu fingið al-Zarqawi

**Amerikanskir hermenn mundu fingið fatur á yvirgangsleiðaranum Abu Musab al-Zarqawi herfyri**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanska stjórnin hevur lovað 25 milliónir krónur í finningarløn, um onkur kann avdúka, hvar yvirgangsleiðarin Abu Musab al-Zarqawi fjalir seg, men higartil hevur tilboðið ikki fingið nakran at siga, hvar hann er. Men sambært amerikanska blaðnum Christian Science Monitor mundu amerikanararnir kortini



*Amerikanararnir halda, at Abu Musab al-Zarqawi er høvuðsmaðurin aftan fyri tær nógvu atsóknirnar í Irak*

fingið fatur á al-Zarqawi herfyri.

Tað var ein dagin í februar, at amerikanskir hermenn góvu tveimum bilum boð um at steðga við eina vaktarstøð nærhendis Bagdad. Tann fremri bilurin steðgaði, men tann aftari vendi og koyrdi avstað við nógvari ferð. Tað eydnaðist kortini hermonnunum at fáa bilin aftur, og tað vísti seg, at tveir medarbeiðarar hjá al-Zarqawi vóru í honum. Hjá sær høvdu teir eina farteldu, sum sambært Christian Science Monitor skal hava givið amerikanarunum nógvar áhugaverdar upplýsingar.

Sambært blaðnum er tað ikki óhugsandi, at al-Zarqawi var í bilinum, og at tað eydnaðist honum at sleppa til rýmingar, áðrenn teir amerikonsku hermenninir fingu fatur á honum.

Ein embætismaður í verjumálaráðnum Pentagon skal sambært Christian Science Monitor hava váttað, at amerikanararnir hava fingið nógvar upplýsingar úr farteldini. Millum annað eru har upplýsingar um heilsustøðuna hjá yvirgangsleiðaranum, og sum skilst er hon ikki serliga góð.

# Marihuana eigur at vera lógligt í Evropa

**Nú koma so nógv fremmand ferðafólk til Niðurlond at roykja marihuana, at rættast er at gera evnið lógligt í øllum Evropa, heldur ein niðurlendskur ráðharri**

RÚSEVNI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Niðurlendski ráðharrin í nýskipanarmálum, Alexander Bechtold, hevur vakt ans, eftir at hann í einari sjónvarpssamrøðu hevur sagt, at eftir hansara tykki eigur tað at vera lógligt at brúka rúsevnið marihuana í øllum Evropa.

Eftir lógini er tað ikki loyvt at brúka marihuana í Niðurlondum, men fólk verða kortini hvørki tikin ella revsað, so leingi tað snýr seg um smáar nøgdir. Summar matstovur hava fingið loyvi til at selja evnið, men tann konservativa stjórnin hevur roynt at tálma nýtsluni við at geva færri matstovum tílíkt søluloyvi.

Men sambært Alexander Bechtold hevði tað helst verið rætt at gjørt evnið lógligt - ikki bara í Niðurlondum, men í øllum Evropa. Hann vísir á, at á hvørjum ári koma ferðafólk í hópatali úr Belgia, Týsklandi og øðrum londum til Niðurlond at roykja marihuana, og tí heldur hann, at tey áttu at fingið loyvi at brúka evnið í heimlandinum.

Niðurlendska tjóðartingið skuldi umrøða hugskotið hjá ráðharranum í gjár.